# Kóka suppu úr ongum

**Jón Tyril, G! fyriskipari, kjakast á Kjak. fo og metir at miðlar og Summarfestivalur áttu at gjørt meira við at ávara um veðrið.**
**- Tey sum siga, at veðurfrøðingar søgdu frá sera ringum veðri, kóka suppu úr ongum, tí sagt varð ikki frá so ringum veðrið, sum tað vísti seg at blíva, metir Steintór Rasmussen, fyriskipari**

SUMMARFESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Jón Tyril, G! fyriskipari, hevur inni á kjak.fo eina viðmerking, har hann kemur inn á viðurskiftini, nú Summarfestivalurin varð raktur av vánaligum veðri.

Í hesum sambandi hava vit sett Jón Tyril spurningin, hvussu G! festivalurin hevði klárað slíkt veður.

- Vit høvdu sjálvandi fyrst hugsað um fólk vóru í vanda, og síðani lukkað alt niður. Vit høvdi eina trygdarætlan og gjørdu nógv burturúr, at samskiftið millum ymsu partarnar vóru í lagi, sigur Jón Tyril

Jón Tyril sigur, at á G! hava tey ikki havt eina nágreiniliga ætlan B (Plan B, blðm.).

- Men á G! var eisini sagt frá góðum veðri. Men vit hava ta tummilfingurreglu, at vit rokna við tvær ferðir so nógvum vindi, sum sagt verður frá, sigur Jón Tyril.

Spurdur, um tað ikki er eitt sindur "ókollegialt" av honum sum samskipara av øðrum festivali at fara út við viðmerkingum um ódnarveðrið á Summarfestivalinum, sigur Jón, at hann sum so ikki hevur sagt so nógv.

- Eg havi bara lagt dent á, at vit øll eiga at læra nakað av hesum, sum hendi. Og vit øll sum skipa fyri slíkum eiga at taka hetta sum dýran lærupening, sigur Jón Tyril.



### Kóka suppu úr ongum

Steintór Rasmussen, fyriskipari av Summarfestivalinum, sigur, at tey sum siga, at sagt var frá so ringum veðrið, sum talan bleiv um, kóka suppu úr ongum.

- Í veruleikanum varð ikki sagt frá so ringum veðrið, sum tað í veruleikanum bleiv, sigur Steintór Rasmussen.

Vit vóru í samband við fleiri veðurstovur, sigur Steintór Rasmussen.

Hann metir annars, at teir vóru rættiliga væl fyrireikaðir. Summarfestivalurin hevði tilbúgving og hevur í longri tíð samstarvað við Norðoya bjargingarfelag.

- Klaksvíkin er annars væl fyri, um óveður brestir á. Summarfestivalurin er mitt í býnum,og her eru hallir, løgregla, sjúkrahús og annað. Tað sum kann henda, og kanska hendi í hesum førinum, er, at nógv fólk er á økinum, tá óveður brestir á, og tað tók okkum kanska eitt sindur á bóli, sigur Steintór.

- Men t.d. fór stóra Flagstjaldið ongan veg, men tey smærru tjøldini. Men tað er greitt, at allir fyriskiparar eiga at skriva sær aftanfyri oyrað, at slíkt kann henda og síðani hugsa meira um fólk, enn um materialini, sigur Steintór Rasmussen.

### 2000 fólk á møti í høllini

At ongin ætlan B veruliga er, viðgongur Steintór, men hinvegin meta fyrireikararnir, at Summarfestivalurin er so stórur, at tiltøkini mugu vera úti.

Ein ætlan var um at flyta tiltøk í Flagstjald og í høllina, men bert 800 fólk fingu loyvi at koma í høllina.

- Eg haldi tað er løgið, at 2000 fólk kunnu vera á møti í høllini, men tá brúk er fyri tí, sum hendan dagin, so verður loyvi bert givið til 800 fólk, sigur Steintór Rasmussen.

Hann gleðist annars yvir, at tiltøk og tilbúgving riggaðu væl á Summarfestivalinum og hann takkar teimum, ið gjørdu eitt stórt arbeiði, so alt eydnaðist so væl, sum møguligt.

Enn er onki avgreitt viðvíkjandi møguligum endurgjaldi fyri atgongumerki.

- Fólk skilja ógvuliga væl støðuna, og hetta hava vit merkt og fingið at vita frá fleiri. Hetta er annars ein sera fløktur spurningur, sum arbeitt verður við, sigur Steintór.

Ongin avgerð er enn tikin um festivalin komandi ár.

- Vit taka eitt ár í senn, men persónliga havi eg gott mót, men enn er onki avgjørt viðvíkjandi einum møguligum festivali komandi ár, sigur Steintór Rasmussen.

# Gott barnatiltak fríggjadagin

**Fríggjadagin seinnapartin byrjaði Summarfestivalurin við tiltakið fyri børn, og hetta eydnaðist væl í stúgvandi fullum Flagstjaldi**

SUMMARFESTIVAL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Barnatiltakið fríggjadagin seinnapartín riggaði stak væl og Flagstjaldið var eisini stúgvandi fult av børnum og vaksnum, ið eisini hugnaðu sær.

Óli eldblásari og gyklarin Ásbjørn løgdu fyri. Børnini vóru hugtikin av Óla, ið loftaði við logandi bóltum og spýtti eld.

Trølla Pætur og Omman hugtaka bæði børn og vaksin, og so var eisini hesaferð. Og nýggja Ommudiddan, sum fyrstuferð var á palli, ger ikki framførsluna verri. Lítil á vøkstri, men so nógv villari, enn Omman, íð annars er tiltikin vill.

Angela og Hannebal duga enn, og børnini kenna tey. Og tey kenna børnini. Tey duga sjáldsama væl at fáa børnini við í framførsluna. Børnini eru 100% við og í parti við Angelu, tá Hannebal roynir at lumpa. Og tó at øll vita, at øll vita, at Hannebal veit og at Angela veit, so riggar hetta hvørjaferð. Ongin kann tó vita seg tryggan, tí Hannebal er ein kúllur, sum ikki smæðist fyri at sproyta vatn á bæði stór og smá.

Silvi, og hansara felagar, høvdu okkurt gott til børnini og tiltakið eydnaðist sera væl, og børnini fingu sín part av festivalskránni.

# Føroyingur í Starfighters

**Tá Starfighters finalan verður á Skanderborg Festivalinum í annaðkvøld, verður tað við føroyskari luttøku**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Odense bólkurin The Joules við m.ø. føroyska oddamanninum Johan Petersen er við í stóru kappingni, ið Skanderborg Festivalurin, útvarpsrásin P3 og MTV skipa fyri. Tað er sjónbandalagið Everything' s OK, ið bólkurin sendi til MTV, ið hevur latið dyrnar upp til kappingina.

Bólkurin The Joules var í Føroyum í fjør og spældi undir heitinum Fuzzphase.

Bólkurin hevur fingið nógv góð orð við á vegnum. Undir navninum Fuzzphase góvu teir út EP´ina Everything´s OK. Gaffa og Garageband skrivaðu lovandi orð um útgávuna. Kendi danski gittarleikarin, sangarin og sangskrivarin, Tim Christensen kallaði bólkin eina power-trio í altjóða flokki. Sí eisini heimasíðuna www.myspace.com/thejoulescom

Í 2003 var ein av vinningunum í Prix Føroyar, luttøka í Starfighters finaluni. Tá eydnaðist tað ikki Prix Føroyar vinnaranum Gestum at vinna plátusáttmálan, ið er fyrsta virðisløn í kappingini.

# Nýtt føroyskt lag á Dansktoppen

**Føroyingur hevur fingið eitt lag innn á Dansktoppen og nú ræður um at atkvøða, so lagið fær fótin fastan**



TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað hevur eydnast argjamanninum og útisetanum Hans Jacob Mouritsen, at fáa eitt lag á danska hitlistan Dansktoppen. Lagið, sum er spildurnýtt og eitur "Forårets lyse time", verður sungið av vinmanninum Lars Ole Holm. Lagið er undir sokallaðu "ugens bobler", og er á veg inn á listan, um tað fær nóg mikið av atkvøðum.Føroyingar, ið ynskja Hans Jacob á listanum, kunnu til sunnudagin kl. 18:00 atkvøða lagið heilt inn á listan. Hetta kann gerast við at senda SMS til telefon nr. 00451212 og skriva dktop 11. Hans Jacob hevur m.a. skrivað Argjasangin, sum ofta er at hoyra í útvarpinum, tá kappróðrarbátarnir av Argjum vinna ein róður. Hann gav eisini fløguna "Navnleysur" út í fjør.